KÍF-Neistin 25-30 (13-16)

# Neistin vil ikki gevast

**Neistin heldur framhaldandi fast um vónina fyri heiðursmerkjum, eftir at teir sunnudagin bastu kollfirðingum, sum annars hava verið sera væl koyrandi í ár**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Seinastu vikurnar hevur tosið í Kollafirði partvíst gingið um, hvussu langt kollfirðingar mundu fara at klintrað upp eftir stigatalvuni í ár.

Eftir eina sera laka byrjan, hevur gingið at kalla upp á stás í endaspælinum, og fram til sunnudagin vóru tað bert vestmenningar, sum høvdu bast kollfirðingunum í grundspælinum.

Millum sigrarnar hjá KÍF á vegnum taldist dysturin í Havn móti Neistanum, men talan gjørdist so ikki um nakra endurtøku sunnudagin.

### Svart korter

Í fyrra hálvleiki vóru tað annars teir á heimaliðnum, sum vóru oman á fyri tað mesta. Tá hálvleikurin var hálvrunnin, var støðan 12-8 til heimaliðið, men eftir hetta fór at ganga fullkomuliga galið. Tað eydnaðist bert kollfirðingum at fáa sær eitt mál afturat undan steðginum, og tá Neistin so samstundis helt á at skora, eydnaðist teimum eisini at vinna seg fram um. Svarta korterið hjá heimaliðnum viðførdi so, at Neistin fekk skapt sær ein fyrimun, sum eisini skuldi vísa seg at verða avgerandi fyri dystin.

Restina av dystinum royndu kollfirðingarnir at vinna tað mista inn aftur, men hetta eydnaðist ongan tíð, og við sigrinum má sigast, at kollfirðingar eru endaliga burturi úr stríðnum um heiðurskrónur. Hinvegin helt Neistin fast um sín møguleika, sum nærum sá út til at vera mistur, eftir at teir hava verið fyri nøkrum tapum seinastu dystirnar.



*Hesa ferð eydnaðist ikki kollfirðingum at fáa tvey stig, og harvið hava teir helst mist møguleikan fyri heiðursmerkjum*

### Nýskipað verjuspæl

Tað var eisini ein væl nøgdur Jákup Sverri Kass, sum vit fingu orðið á, tá sigurin var komin til høldar.

– Fyri at verja fyri stóru skjúttunum hjá teimum, royndu vit allan dystin at spæla við eini offensivari 3-2-1 verju. Tað eru vit ikki vanir, og at byrja við høvdu vit eisini trupulleikar við hesum.

– Tað, sum vendi dystinum, var at vit eftir eitt time-out fingu rættiliga fatur í verjupartinum. Samstundis byrjaði Jacob Jónsson veruliga at gera um seg, og so ráddi bara um at halda fast. Tað gekk eisini væl í verjupartinum í seinna hálvleiki, og ikki minst í álopsspælinum fingu vit nú nøkur nýggj system at koyra, so alt í alt eri eg sera væl nøgdur við dystin, sigur Jákup Sverri, sum annars eisini rósti dómarapartinum fyri eitt sera gott avrik.

Um møguleikan fyri heiðursmerkjum sigur Jákup Sverri, at teir sjálvandi trúgva upp á hendan.

– Vit royna so avgjørt at enda millum trý tey fremstu liðini, og so mugu vit bara síggja, hvussu langt tað røkkur, sigur fyrrverandi løgtingsmaðurin at enda.

### Dysturin í tølum

*sk ttar*
Jákup Dam 7, Durica Tomic 7(1), Petur Martin Johansen 5(3), Petur Martin Poulsen 2, Iljan Topic 2, Jónálvur Johannesen 1, Kristian Madsen 1
*istin* Kári Mortensen 9(5), Jacob Jónsson 8, Rune Møller 4, Ragnar Zachariasen 3, Helgi Justinussen 3, Jákup Sverri Kass 2, Áki Mørk 1
*rotskøst*
KÍF 6, Neistin 5
*tv singar*
KÍF 6, Neistin 3
*iskva ifikati n*
KÍF 1 (3X2 minuttir)
*arar r t*
Pole Hansen
og Justines Justinussen

Tjaldur-Stjørnan 20-21 (6-14)

# Um reppið at Stjørnan snávaði

**Alt sá út til at ganga upp á stás hjá kvinnuliðnum úr Stjørnuni, tá tær móti Tjaldri sunnudagin høvdu eina trygga leiðslu uppá 8 mál, tá farið varð undir seinna hálvleik. Men Tjaldur kom aftur, og tá avtornaði var bert eitt mál, ið skilti liðini sundur**

HONDBÓLTUR
*Heini í Skorini*

Stjørnan hevur ikki havt eina góða seinnu helvt í hesum kappingarárið, eftir at tær í fyrru helvt lógu líð um lið við oddaliðið VÍF. VB hevur nú yvirhálað klaksvíksskvinnurnar í landskappingini, og tí var ein sigur á Tjaldri í Runavík sunnudagin eitt krav, um tær ikki skuldu missa VB úr eygsjón.

Tað gekk eisini sera væl hjá Stjørnuni at byrja við, og tær komu uppá heili 5 mál, áðrenn Tjaldur fekk sítt fyrsta mál. Tær høvdu fullkomiliga tamarhald á dystinum, og tær spældu eisini væl. Tjaldur fekk ikki sítt spæl at hanga saman, og verjan hjá Stjørnuni tyktist vera ov sterk til kvinnurnar úr Tjaldri. Í øllum førum megnaðu tær bert at skjóta seks mál allan fyrra hálvleik, meðan Stjørnan fekk 14 mál. Sostatt sá dysturin longu út til at vera avgjørdur, tá liðini fóru til hálvleiks.

### Tjaldur kom aftur

Í seinna hálvleiki sóu liðini út til at vera javnari enn í fyrra, tá Stjørnan fullkomiliga hevði stýrt dystinum. Bæði liðini skiftust um at fáa mál, men tað broytti lítið um støðuna, og tað skuldi meiri til hjá kvinnunum úr Tjaldri at koma innaftur í dystin.

Um tær hava hugsað júst hetta, er ilt at vita, men miðskeiðis í fyrra hálvleiki tók Tjaldur yvir í dystinum, og tær sótu fullkomiliga á dystinum. Tá støðan var 19-11 til Stjørnuna, setti Tjaldur gongd á álopsmaskinuna, og áðenn áskoðarar og kvinnurnar hjá Stjørnuni vistu av, skoraði Tjaldur ferð eftir ferð, og sostatt nærkaðust teir meiri og meiri stagneraðu kvinnunum úr Stjørnuni.

Tjaldur kom heilt uppá 18 mál, meðan Stjørnan hevði 19, og knappliga var veruligur spenningur í dystinum í høllini í Runavík. Men Stjørnan fann í síðstu løtu fótafestið aftur, og tær fingu økt um leiðsluna til 20-18. Tjaldur megnaði aftur at minka leiðsluna niður í eitt mál, tá tær skoraðu til 19-20, men Stjørnan noktaði at geva seg, og tær skoraðu aftur, tá bert tríggir minuttir vóru eftir. Tjaldurskvinnurnar minkaðu aftur, so munurin millum liðini bert varð eitt mál, men Tjaldur megnaði aldrin at fáa útjavnandi ella vinnandi málið, sum tað ta einu løtuna sá út til at tær kundu fáa.

Ein av leikarunum hjá Stjørnuni, Annika Ljósstein, segði eftir dystin, at tær slakkaðu ov nógv av í seinna hálvleiki, og at tað var tað sum gjørdi, at Tjaldur kom innaftur í dystin. Annika segði, at hóast tær avtalaðu í hálvleikinum at halda á við sama spælið og somu ferð, hildu tær ikki á við góða spælinum, og skyldaðist tað allarhelst sannførandi leiðsluni tær høvdu í hálvleikinum.

Endaliga úrslitið var sostatt 21-20 til Stjørnuna, og tað var um reppið, at tær blakaðu alt fyri borð, eftir ein sera góðan fyrra hálvleik. Meistaraheitið er gloppið teimum av hendi, og hetta skyldast eisini skaðar. Í Danmark hevur tær bert ein leikara á bonkinum, meðan spælarar sum als ikki vóru til reiðar at spæla vegna sjúku og skaðum noyddust at spæla við. Alt í alt fekk Stjørnan trý týdningarmikil stig inni í Runavík, og tær kappast enn við VB um silvurkrónurnar.



*Tað var um reppið, at tjaldurskvinnurnar fingu vent dystinum móti Stjørnuni, men tær máttu at enda taka til takkar við teprum tapi*

### Dysturin í tølum

*sk ttar*
*a ur* Milica Ergic 8(3), Mona Langgard 7, Beinta Hansen 3, Kristine Ellingsgaard 2
*t ørnan* Annika Ljósstein 7(1), Anna K. Samson 5, Una Olsen 3, Adriana Milodanovic 2, Bára Skaale 2, Simona Dziugyte 1, Vesna Radovic 1
*rotskøst*
Tjaldur 3, Stjørnan 2
*tv singar*
Tjaldur 1, Stjørnan 4
*arar r yn i*
Hanus Kúrberg
og Hanus Thomassen



# FCK haltaði og Herfølge fall

**Fyrsta umfarið eftir vetrarsteðgin undirstrikaði, at Herfølge sklal stríðast nógv fyri at sleppa undan niðurflyting, og at FCK framvegis hevur ilt við at umseta yvirvág í spæli til mál og harvið sigrar**

SUPERLIGA
*Jóannes Hansen*

Sunnudagin varð sjøtul settur á seinna umfarið av donsku landskappingini. 33. og síðsta umfarið verður spælt mikudagin 13. juni. Tá verður greitt, hvør fer at standa við meistaraskapinum, og hvørji liðini verða, sum far at flyta niður í næstbestu deildina.

20. umfarið var á skránni sunnudagin. Og hóast tað resta 13. umfar, so var tað sum longu í heyst týðuliga sást, undirstrikað. Meistaraliðið frá í gjør, Herfølge, sum Jákup Mikkelsen framvegis verjir málið hjá, er illa statt. Tað fer at snúgva seg um eitt stríð og strev fyri at varðveita sessin í bestu deildini.

Sunnukvøldið var Herfølge á trið aftasta plássinum, men tað kann væl vera, at teir eru verri staddir enn so, tá blaðið verður lisið. Mánakvøldið spældu AB og AGF í Gladsaxe. Hesi bæði liðini eru næstu kappingarneytarnir hjá Herfølge at sleppa undan niðurflytingarplássinum. Um AB megnaði at vinna á AGF, lyftu teir seg upp um Herfølge. Hvussu tað gekk við tí stríðnum, far at frætta meira um í blaðnum í morgin.

Í FCK hava teir síðani kappingarbyrjan, 23. juli í fjør, sagt, at málið hjá teimum var at enda millum trý tey fremstu í superliguni og harvið at vinna rættin til at spæla í Europa Cup komandi kappingarár. Viðhaldsfólkini spenna bogan eitt vet hægri. Hjá teimum telja gullkrónur og einki annað.

### Illa mannaðir

Jákup Mikkelsen og liðfelagarnir í Herfølge vóru sunnudagin í Viborg. Heimaliðið vann 3-0. Tað ljóðar kanska eitt sindur undarligt, men tað er ein veruleiki, at Herfølge hevði bóltin nógv mesta partin av tíðini, at Jákup Mikkelsen hevði millum lítið og einki at gera, og at hann ikki átti nakran lut í málunum.

– Tað sást væl, at talan var um fyrsta týdningarmikla dystin eftir vetrarsteðgin. Ferðin var ikki serliga høg, og inn til teir fingu hol á, tóktist tað sum, at hetta fór at verða ein typiskur 0-0 dystur.

Tað er Jákup Mikkelsen, sum vit hava í telefonini. Tá Viborg tveir minuttir undan steðginum setti hol á, var tað ein av hansara egnu, Torben Christiansen, sum hevði síðsta fótin á. Hann royndi at sparka bóltin burtur, men rakti somikið illa, at hann sigldi í málið aftan fyri Jákup Mikkelsen.

Í 2. hálvleiki skoraði Viborg tvey mál afturat. Á báðum førum var talan stikkbóltar í dýpdina. Báðu ferðirnar var Jákup Mikkelsen seldur, og tað sást týðuliga, at Herfølge hevði stórar trupulleikar í miðverjuni.

– Fleiri av føstu spælarunum hjá okkum eru skaddir, so tað sær ikki so ljóst út, heldur Jákup Mikkelsen.

Søren Frederiksen, sum er ættaður úr Viborg, men sum í fleiri ár hevur verið stórskjútti í Aalborg, skoraði næsta málið hjá heimaliðnum. Hetta var fyrsti landskappingardystur hjá honum í hesum umfarinum í Viborg.

Viborg hevur ikki verið roknað millum tey mest støðugu liðini í superliguni. Nú hava teir vunnið seg upp ímillum tey fremstu, og tað er ikki burtur við at ímynda sær, at teir í ár kunnu vinna DM fyri fyrstu ferð.

### Framvegis lítla úrtøku

Størsta áskoðarafjøldin sunnudagin var í Parkini í Keypmannahavn. Hóast dysturin ímillum FCK og AaB varð sendur beinleiðis á TV3+ rásini, so møttu fleiri enn fimtan túsund upp. Nógv tey flestu vónaðu, at FCK skuldi vinna at harvið av álvara blanda seg seg í oddastríðið. Tey sóu FCK leggja bragdliga fyri og spæla seg til heilar og hálvar møguleikar. Men tey vórðu eisini mint á, at FCK hevur trupult við at fáa mál.

– Tað hekk væl saman hjá okkum fyrstu løtuna. Vit funnu væl hvønn annan, og vit høvdu fleiri málmøguleikar, men tíverri fingu vit ikki mál.

Hetta sigur Todi Jónsson úr Keypmannahavn. Hann var annar av fremstu monnunum í 4-4-2 spæliskipanini. Todi hevði ongan upplagdan møguleika. Í 1. hálvleiki tóktist hann sera væl upplagdur, tá hann tamdi og sneiddi framvið mótstøðumonnum, og einar tvær ferðir var um reppið, at hann gjørdist leysur.

Undir liðini á sær hevði Todi Hene Fernandez, veteranurin úr Viborg, sum er nýggjur maður í FCK.

– AaB hevði ein møguleika, og hann skoraðu teir uppá. Tá teir høvdu fingið mal, var tað ikki so flótandi hjá okkum. Tíbetur fingu vit javnleik. Ståle Solbakken varð rendur um koll, greiðir Todi frá.

Fleiri mettu brotssparkið vera bíligt, og kanska var tað eitt sindur av tí, sum plagar at verða rópt kompensatiónsdómi. Einar tvær ferðir varð Todi skumpaður í ryggin, uttan at dómarin lat við seg koma.

Mesta av uppspælinum hjá FCK var eftir miðásini, har Ståle Solbakken var høvuðsmaður. Í borðunum vóru Suma og Thomas Thorninger. Teir megnaðu sera sjáldan at bróta ígjøgnum og harvið leggja innfyri.

Heine Fernandez varð kosin dagsins maður. Tað mundi ivaleyst komast av, at tað var hann, sum skoraði málið hjá FCK. Burtur sæð frá málinum var nýggi maðurin ikki serliga sjónskur.

### Jylland á odda

Brøndby hevði vitjan av OB, sum fór við øllum stigunum. Heimaliðið hevði eina rúgvu av møguleikum, men fingu bara eitt mál. Í næst síðsta minutti skoraði OB sigursmálið.

At Brøndby tapti hevði við sær, at tvey lið úr Jyllandi komu í toppin. Silkeborg, sum saman við FCK og Brøndby verður metta at vera besta boðið upp á DM, vann grannastríðið ímóti FCM 3-1, og Viborg sigurin á Herfølge hevði við sær, at teir krupu heilt fram í oddin.

Lyngby verður roknað fyri lítið aftur ímóti teimum stóru í Keypmannahavn, FCK, Brøndby og eisini AB, men hóast teir ikki verða so nógv virdir, so roynast teir norðan fyri høvuðstaðin væl. Sunnudagin vóru teir í Haderslev. Gestirnir vunnu 3-1 og løgdu seg á triðja plássið – framman fyri Brøndby og FCK.

# Sessurin hjá Jákupi verður hildin heitur

**FCK hevur leigað norska landsliðsmálverjan í Everton, Thomas Myhre, meðan teir bíða eftir, at Jákup Mikkelsen skal koma úr Herfølge til Keypmannahavnar**

SUPERLIGA
*Jóannes Hansen*

Tað hevur leingi liðið á ljóði, at teir báðir klaksvíkingarnir í superliguni skulu liðfelagar. Danskir fjølmiðlar hava fleiri ferðir sagt og skrivað, at at Jákup Mikkelsen hevur veirð ávegis at smoyggja Herfølge hamin av sær, tí hann skal lata seg í málverjabúnan hjá FCK, men higartil hevur hetta bara verið tos og ikki veruleiki.

– Eg fylgi eisini við tí, sum verður sagt og skrivað í fjølmiðlunum, men eg fái tíverri ikki gjørt nakrar viðmerkingar til tíðindini. Tað er ein veruleiki, at skeiði hjá mær í Herfølge verður liðugt 30. juni. Eg havi boðað felagnum frá, at eg eri ikki sinnaður at halda fram. Herfølge hevur møguleikan at selja meg til okkurt annað felag, um teir og eg semjast við nýggja felagið, men higartil hava teir í Herfølge sagt, at teir ynskja at hava meg sum málverja, staðfestir Jákup Mikkelsen.

### Bindingarnar

Í vikuskiftinum fekk framhaldssøgan um málverjaspurningin hjá FCK nýggj bein at ganga á. FCK heldur seg hava fingið akuttan tørv á einum málverja. Orsøkin er tann, at Michael Stensgaard, sum man vera ein av mest óhepnu fótbóltsspælarunum í Danmak, ikki fær spælt. Hann hevur verið nógv skaddur, og nú er tað ryggurin, sum er somikið illa skaddur, at tað ikki er hugsingur um hjá málverjanum at spæla undan summarfrítíðini.

20 ára gamli Rune Pedersen vardi máli hjá FCK sunnudagin. Hann hevði millum lítið og einki at gera. Í heyst vísti hann, at evnini eru góð, men FCK heldur, at tað er alneyðugt, at ungi maðurin fær kapping frá einum royndum málverja.

Sambært heimasíðuni, sum hava við FCK at gera, so er hesin sessurin ætlaður Jákupi Mikkelsen, men hann sleppur ikki úr Herfølge fyrr enn í summar.

Tvær orsøkir sigast vera til hetta, og tær hava nógv við hvørja aðra at gera. Onnur er, at Herfølge vil hava so stóra upphædd frá FCK, at tað verður mett órímuligt fyri bara fýra mánaðir. Hin er, at teir í Herfølge halda tað vera alneyðugt at hava ein royndan málverja, nú teir skulu stríðast fyri at sleppa undan niðurflyting.

### Norðmaður í sessinum

At tað ikki ber til at fáa Jákup Mikkelsen til Keypmannahavnar hevur havt við sær, at teir í FCK eru farnir aðrar leiðir. Í vikuskiftinum hoyrdist, at teir hava leitið Thomas Myhre upp. Hann er norðmaður, sum er sáttmálabundin við Everton í bestu ensku deildini.

Talan er ikki um hvønn sum helst. Thoma Myhre er norsku landsliðsmálverji, men altjóða royndir eru ikki borgan fyri spælitíð í Onglandi. Norski málverjin situr fyri tað mesta á beinkinum í Liverpool felagnum. Tað ber ikki til, um hann skal verja plássið á norska landsliðnum, og tí eru hann og Everton sinnað at gera avtalu við FCK. Tað snýr um eina leiguavtalu fram til summarsteðgin. Sambært góum FCK keldum er ætlanin framvegis, at Jákup Mikkelsen í summar skal á lønarlistan hjá FCK, men tað hevur Jákup Mikkelsen ongar viðmerkingar til.



*Framhaldssøgan um framtíðina hjá Jákup Mikkelsen fekk enn ein part skrivaðan um vikuskiftið*